# Minnisríkur dagur fyri Bjarka

**FÓTBÓLTUR** Við máli í evstu løtu frá 18 ára gamla Bjarka Johannesen, ið var við fyri fyrstu ferð á besta liðnum, vunnu toftamenn seg úr botninum í Vodafonedeildini. 07 Vestur megnaði ikki at fylgja upp uppá sigurin í Fuglafirði og liggur enn til niðurflyting

Tróndur Arge

| | |
|---|---|
| 07 Vestur | 0 |
| B68 | 1 |



Bæði B68 og 07 Vestur eru við í steypakappingini og tað merkti dystin í Sørvági í gjár. Undan dystinum høvdu bæði liðini átta stig og tí var nógv trýst á báðum liðnum. Tað merktist tó ikki á leikferðini, sum var lág sambært B68 venjarinum Bill McLeod Jacobsen.

Hetta er fúlari enn Premier League. Vit hava spælt tveir til tríggjar dystir um vikuna í tríggjar vikur nú og tað er ótrúligt at leikararnri kunnu avrika tað teir gera, sigur Bill McLeod Jacobsen og heldur fram.

Vit spældu hósdagin og fáa tveir dagar at hvíla í, og skulu so longu spæla aftur sunnudag. Tað merkir at leikarar við smáskaðum hava ongan møguleika at koma fyri seg, umframt at menn eru troyttir. Tað merkti eisini leikferðina í dystinum, sigur Bill McLeod Jacobsen.

Størsta møguleikan í fyrra hálvleiki fall til B68, men 07 Vestur framherjin, Clayton Soares, bjargaði á strikuni. Hann var við frá byrjan aftur, eftir at hava sitið uttanfyri í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini í Fuglafirði.

### Bjarki avgerð fyri toftamenn

Miðskeiðis í seinna hálvleiki gjørdist uppgávan tørførari fyri 07 Vestur, tá Sjúrður Ellefsen fekk sítt seinna gula kort. B68 legði nú trýst á vertirnar, men tað var ikki fyrr enn toftamenn skiftu 18-ára gamla Bjarka Johannesen inn, at avgerandi málið kom. Tveir minuttir fyri tíð hevði B68 horna. Inni í brotsteiginum sleit Bjarki Johannesen seg leysan frá markeringini og var fyrstur á bóltinum, sum endaði í netinum. Sostatt avgjørdi Bjarki Johannesen sín fysta dyst í bestu deildini. Í vikuni hevur hann sambært B68 heimasíðuni skorað hattrick fyri bæði unglingaliðið og næstbesta liðið hjá B68.

– Bjarki er ein ungur maður, sum hevur verið ávegis í longri tíð og evnini eru eyðsýnd. Hann hevur vant dúgliga við næstbesta liðnum og teir hava klára seg væl. Vit manglaðu fleiri leikarar til dystin, so eg heitti á hann og Jóan Petur Petersen til dystin í gjár. Teir komu so báðir inn, og Bjarki endaði við at avgerða dystin, so tað var bara deiligt, sigur Bill McLeod Jacobsen at enda.

Komandi uppgávan hjá B68 er á Toftum móti grannunum úr Runavík, meðan 07 Vestur í Sørvági tekur móti EB/Streymi, ið spælur í kvøld móti B71.

# Valur aftur á sigurskós

**FÓTBÓLTUR** Allir teir tríggir føroysku landsliðsspælarnir hjá Vali byrjaðu inni ímóti Fram. Sigursmálið fall stutt undan leikloki

Heri Simonsen

Guðjón Pétur Lýðsson gjørdist tann stóra hetjan hjá Vali, tá hann á heimavølli Vals, Vodafonevøllinum á Hlíðarenda í Reykjavík skoraði einasta málið í dystinum í grannauppgerðini ímóti Fram. Málið kom stutt undan leikloki. Heimaliðið hevði fleiri royndir ímóti málinum enn gestirnir, men tað gekk striltið at fáa mál. M.a. hevði Christian R. Mouritsen onkra roynd á málið hjá Øgmundi Kristinsson í Fram-málinum. Jónas Tór Næs og Pól Jóhannus Justinussen vóru vongverjar hjá Vali, og Christian R. Mouritsen var millum teir framrættaðu. Tíggju minuttir undan leikloki varð Christian R. Mouritsen skiftur út, og Jónas og Pól Jóhannus vóru á vøllinum alla tíðina. Eftir fimm umfør er Valur á triðja plássi við níggju stigum. Eitt annað Reykjavíkar-felag, KR liggur á odda í Pepsideildini við 11 stigum. ÍBV av Vestmannaoyggjunum er nummar tvey við 10 stigum.

### Tolni loysti seg

Við íslendska Morgunblaðið segði Kristján Guðmundsson, venjari, at tað loysti seg hjá hansara monnum at verða tolnir. Vals-venjarin helt fyri, at Fram fór at spæla júst so verjukent, sum hann hevði væntað. Komandi sunnudag tekur Valur ímóti gamla felagnum hjá Hans Fróða Hansen, Breiðablik, sum liggur á sætta plássi í Pepsideildini við sjey stigum. Eftir tann dystin gongur leiðin hjá Poul Johannus Justinussen, Jónasi Tór Næs og Christiani R. Mouritsen heim til Føroya, fyri at spæla EM-undankappingardystir ímóti Slovenia og Estlandi á Svangaskarði.

heris@sosialurin.fo